VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag og hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið millim ÷2 og ÷6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Hann minkar vindin niður í lot av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +2 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum frostmarkið og +4 stig.

Angela og Hannibal fantastisk

Nógvu børnini, sum vóru á Kambsdali um vikuskiftið, høvdu tveir óførar dagar. Kattakongar vórðu funnir og nógv undirhald av ymsum slag var á skránni

FØSTULÁVINTSHALD
Jonhard Hammer

Angela og Hannibal undirhildu í ítróttarhøllini á Kambsdali

Um vikuskiftið skipaðu ÍF-stuðlar fyri Leikalandi og føstulávintshaldi í ítróttarhøllini á Kambsdali. Leygardagin varð skipað fyri tunnusláttri fyri børnum frá 0–6 ár og 7–14 ár. Nógv børn vóru møtt upp grýluklødd, og tey hugnaðu sær óført. Aftaná tunnuslátturin fingu tey kakao og fastalávintsbollar. Eisini bjóðaði MBM Pop Top sunkist.

Ì ítróttarhøllini var eisini ein pallur, og sunnudagin kl. 17.00 undirhildu Angela og Hannibal har. Tað vóru nógv børn komin at hyggja eftir Føroya bestu barnaundirhaldarum. Framførslan byrjaði við at Angela kom fyrst á pallin. Hon hevði nokk við at biðja børnini fara av pallinum. Børnini vóru so spent og øll vildu sleppa at tosa við hana. Tá ið Angela hevði fingið børnini av pallinum, byrjaði showið. Angela ópti »Hvar er Hannibal« og øll børnini reistust og royndu at fáa eyga á hann. Jú, hann kom rennandi gjøgnum høllina og øll vóru á gosi.

Angela og Hannibal framførdu fyri tað mesta gandakynstur og undirhildu við ballónum. Hesum vóru børnini sera hugtikin av.

Hæddarpunktið av framførsluni var, tá ið tey fóru í vatnkríggj. Angela hevði ein lítlan revolvara, meðan Hannibal snýtti fleiri ferðir, hann tók stórar maskinbyrsur og sproytaði eftir Angelu og børnunum. Hetta var eitt spennadi vatnkrígg, og tað dámdi børnunum lítið at Hannibal snýtti og sproytaði nógv vatn á Angelu. Men tað var ein heiður hjá børnunum at Hannibal sproytaði vatn á tey.

Tilboð úr útlandinum

Seinastu árini hava Hannibal og Angela havt nógvar framførslur í Føroyum. Og ikki kann sigast annað enn at øll tey føroysku børnini elska tey. Nú hevur eisini útlandið sent boð eftir teimum. Men tey hava í fyrstu syftu sagt nei. »Vit hava fingið tilboð um at ferðast runt í Danmark við einum leikalandi« sigur Angela. »Men vit hava sagt nei, tað liggur ikki fyri hjá mær í løtuni, eg eri upptikin av arbeiði og øðrum. Men tað kundi verið sera spennandi at prøva at undirhildið uttan fyri Føroyar« leggur hon aftrat.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷8
Nuuk	÷3
Qaqortoq	3
Ammassalik	÷1
Saint John's	3
Halifax	÷2
Reykjavík	1
Seyðisfjørður	0
Tórshavn	7
Lerwick	3
Aberdeen	4
London	4
Tromsø	÷3
Bergen	1
Oslo	–
Stokkhólm	0
Keypmannah.	0
Helsinki	÷8
Moskva	÷1
Berlin	1
Warzawa	1
Kiev	0
Bukarest	5
Paris	4
Madrid	6
Róm	14
Malorca	15
Athen	15
Malta	16
Tunis	18
Beijing	13
New Dehli	24
Bangkok	32
Jakarta	32
Sydney	–
New York	6
Miami	25
Los Angeles	13
Meksikobýur	23
Panama	32
La Paz	12
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	24

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt djúpt lágtrýst, 970 hPa. við Vestur-Noreg grynnist. Eitt hátrýst, 1036 hPa. á 52N-26V stendur mestsum í stað.

Lágtrýstið við Vestur-Noreg grynnist framvegis, men vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft enn mót Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 23/02 kl. 06⁰⁰–24/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,7°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 7,1 mm –mált frá 23/02 kl. 06⁰⁰–24/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 79,3 mm

VESTFALLSKYRRINDI

16. februar: Mánin næstur jørðini
20. februar: Tendring
28. februar: Fyrra kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
25. feb	10.16	22.37	09.16	21.37	09.31	21.52	—	12.16	00.56	13.16	08.31	20.52	07.31	19.52	10.31	22.52	11.31	23.52	10.01	22.22	11.16	23.37
26. feb	10.58	23.19	09.58	22.19	10.13	22.34	00.37	12.58	01.37	13.58	09.13	21.34	08.13	20.34	11.13	23.34	—	12.13	10.43	23.04	11.58	—
27. feb	11.42	—	10.42	23.05	10.57	23.20	01.19	13.42	02.19	14.42	09.57	22.20	08.57	21.20	11.57	—	00.34	12.57	11.27	23.50	00.19	12.42
28. feb	00.05	12.42	11.42	—	11.57	—	02.05	14.42	03.05	15.42	10.57	23.34	09.57	22.34	00.20	12.57	01.20	13.57	—	12.27	01.05	13.42

5 707265 100036 >